Deyði laksurin "osar" eina øgiliga smittu úr sær

Tann parturin av alivinnuni, sum bæði er raktur av ILA-sjúku og verkfalli, hevur tað ógvuliga trupult í hesum døgum, og tað eru stór virðir, sum fara fyri bakka. Á Gøtuvík hevur P/F Luna laks gangandi fyri 30 milj. krónur, og har stríðast menn við undantaksloyvi frá arbeiðarafeløgunum at fáa sjúka fiskin upp úr aliringunum. - Hetta er sum eitt brennandi virki, ið fer uppí royk, sigur Atli Gregersen hjá P/F Luna

VERKFALL OG ALING
Vilmund Jacobsen

Stutt fyri verkfallið á privata arbeiðsmarknaðinum gjørdist veruleiki, varð ILA-sjúka í útbroti staðfest í tveimum aliringum hjá P/F Luna á Gøtuvík. Í hesum ringum ganga tilsamans 800 tons av laksi, og tá ið súkan er í útbroti, er støðan ógvuliga álvarsom. Einasti "heilivágur", sum hjálpir, er at tøma ringarnar so skjótt tilber, soleiðis at smittan ikki breiðir seg til grannaringar og grannafirðir.

Takksamir

Atli Gregersen, sum hevur ábyrgdina av alingini hjá P/F Luna, er sera fegin um undantaksloyvið, sum felagið hevur fingið frá arbeiðarafeløgunum. Felagið hevur nevniliga fingið loyvi at hava 30 fólk í arbeiði, og tað merkir, at takast kunnu eini 20-25 tons av laksi um dagin. Laksurin verður kruvdur, pakaður og frystur í Gøtu og á Strondum, har felagið hevur leigað seg inn.

- Undantaksloyvið er ein stórur bati, tí nú sleppa vit at kryvja og pakka so nógv, sum vit klára at frysta.

Hann sigur, at teir leygardagin og sunnudagin tóku góð 40 tons úr tí aliringinum, sum er harðast raktur. Í hesum ringinum doyggja einir 150 fiskar um dagin; í hinum einir 75-100.

- Men tá ið sjúkan er í útbroti, veksur fellið skjótt, og vandi er fyri, at tað eksploderar. Soleiðis kunnu vit rokna við, at einir 1000 fiskar skjótt fara at doyggja í ringunum um dagin, sigur Atli.

Fíggjarligt tap

Hann vísir á, at hóast undantaksloyvið, sum Luna hevur fingið, er ein stórur bati, hevði felagið helst tikið einar triggjar ferðir so nógv úr ringunum um dagin, um einki verkfall var. Haraftrat kemur, at allur fiskurin, sum nú verður tikin, verður frystur, og tað minkar um søluvirðið.

- Høvdu vit ikki verkfall, høvdu vit helst tikið eini 60 tons úr ringunum um dagin. Tá hevði fiskurin ikki verið frystur, men seldur pakkaður og ísaður av landinum umframt til portiónsvirkir í Føroyum, sum meirvirka laks.

Atli sigur, at hóast støðan ikki er fullnøktandi, nú verkfall er, eru teir sera fegnir um at vera slopnir "framat" fiskinum, sum hann tekur til.

Spurdur, hvussu stórur missurin verður, nú fiskurin verður frystur og ikki seldur ísaður, sigur hann:

- Tað veldst sjálvsagt um, hvussu leingi verkfallið varar, og hvussu stórur partur av fiskinum verður tikin á henda hátt. Siga vit, at eini 200 av teimum 800 tonsunum í ringunum, sum hava ILA í útbroti, verða tikin, er talan um eitt tap í prísi uppá einar 400.000-500.000 krónur. Hinvegin vita vit ikki, hvussu stórt fellið kann gerast, sum tíðin gongur.

Atli sigur, at samlaða virðið av fiski í aliringunum hjá Luna á Gøtuvík liggur um 30 milj. krónur.

Loðandi virki

- Vit hava 5 aliringar á Gøtuvík, harav ILA er í útbroti í teimum tveimum.

Hann sigur, at ILA-sjúkan er so mikið álvarsom, at hon hevur fráboðanarskyldu.

- Vit hava fingið kravboð frá landsdjóralæknanum um, at ringarnir, har ILA er í útbroti, skulu tømast sum skjótast, men sum er, má hetta taka ta tíð, tað tekur. Vit kunnu ikki gera annað enn tað, vit hava fingið loyvi til frá arbeiðarafeløgunum í verkfalli, sigur Atli.

Luna hevur eisini aling á Miðvági og aðrastaðni, og har eingin sjúka er, megna formenninir at gera tað mest neyðturviliga arbeiði, soleiðis at fiskurin í fyrsta lagi verður hildin á lívi.

Hann sigur, at eitt alibrúk, sum er rakt av ILA í útbroti undir einum verkfalli, er at sammeta við eitt virki, sum stendur og brennur.

- Eldurin má sløkkjast sum skjótast. Annars fer alt fyri bakka, og í hesum førinum er stórur vandi fyri, at sjúkan breiðir seg og ger feigdina um seg.

Long ígerð

Spurdur, um ILA-sjúkan breiðir seg skjótt, sigur Atli, at tað undarliga tykist vera, at sjúkan smittar seint.

- Í øllum førum er greitt, at ígerðartíðin er long, men kortini er ILA staðfest næstan í hvørjum króki í Føroyum, har aling fer fram. So, vit kunnu í hvussu er siga, at sjúkan smittar ríkiliga illa. Hvaðani hon kemur í hvørjum einstøkum føri, er ilt at siga, tá ið ígerðartíðin er lutfalsliga long, sigur Atli.

Hann heldur, at smittuvandin er størri, tá ið fiskurin hevur ILA í útbroti.

- Líkt er til, at fiskurin "osar" eina øgiliga smittu úr sær, tá ið hann doyr, sigur Atli Gregersen.

Vantandi prísvøkstur stimbrar lánsbrøv

MARKNAÐARRÁK

Positiva gongdin á lánsbrævamarknaðunum, síðani amerikanski tjóðbankin, FED, hevði rentufund 6. mei, helt á fram í síðstu viku. Sostatt hava lánsbrøv sum heild aftur staðið seg væl seinastu dagarnir. Umframt árinini frá tjóðbankanum, hava eisini lyklatøl stimbrað lánsbrævagongdini. Nevnast kann, at tøl fyri prísgongdina á framleiðslurávørum í USA hava staðfest prísgongdina á nýtsluvørum. Herumfram hava eisini tøl fyri smásølu í USA víst á, at striltið gongu í amerikanska búskapinum. Slík negativ tíðindi stimbra lánsbrøvum og renturnar eru sostatt sum heild falnar seinastu vikuna.

Hóast lánsbrøv hava staðið seg væl, hava partabrøv eisini staðið seg hampuligt seinastu vikuna. Vanligt er, at sokallað øvugt samsveiggj er millum láns- og partabrøv, men seinastu vikurnar hevur hetta ikki verið galdandi. Hesir báðir virðisbrævabólkar, hava sostatt sveiggjað ótengdir hvør at øðrum. Orsøkin er, at positivu ársfjórðingsroknskapirnir enn hava ávirkað og at útlitini fyri rentulækkingum vilja stimbra gongdini.

Vantandi prísvøkstur er stimbrandi fyri lánsbrøv og sera sannlíkt vilja longu lánsbrøvini sostatt standa seg væl, so leingi hesin er fellandi ella støðugur. Hóast prísvøksturin undatikið orku og matvørur, sokallaði kjarnuprísvøksturin, er fellandi meðan samlaði prísvøksturin er hækkandi, vil samlaði prísvøksturin sannlíkt eisini fella sum frálíður. Hóast oljuprísurin síðani byrjanini av mei er hækkaður umleið 13% er hesin kortini fallin 23% síðani byrjanina av mars. Fallið í oljuprísinum vil sum frálíður vísa seg í prísvøkstinum, og sostatt stimbra lánsbrævamarknaðirnar. Vit meta tí framvegis, at long lánsbrøv kunnu standa seg væl komandi tíðina, hóast renturnar í løtuni eru á einum lágum støði. Havast skal tó í huga, at størri váði er tengdur at longum lánsbrøvum enn stuttum lánsbrøvum.

Seinasta tíðin hevur verið merkt av roknskaparkunngerðum. Áhugaverdastu virkini hava kunngjørt, og avmarkað árin skal væntast frá hesum viðurskiftum komandi tíðina. Partabrøv hava staðið stinn seinastu dagarnar, og roknast kann eisini við at hesi fara at vera rímuliga støðug næstu vikuna. Hóast PanFish í stóra høpinum ikki er týðandi virki longur, er áhugavert at nevna, at teir kunngera roknskap 22. mei - sigast má, at PanFish hevur serføroyskan áhuga í hesum døgum.

Rentur

	Renta	+/- %-stig
Diskonto	2,50%	0,00%
2 ára lánsbræv	2,59%	-0,13%
5 ára lánsbræv	3,23%	-0,13%
10 ára lánsbræv	4,01%	-0,13%

Partabrævavísitøl

	Kursur	+/- %
KFX, Danmark	208,3	3,5%
OMX, Svøriki	518,5	0,5%
DJ Stoxx 50, Evropa	2342,5	2,0%
S&P 500, USA	944,3	-0,1%

Íløgufeløg

	Kursur	+/- %
Lánsbrøv í DKK	106,6	0,0%
Evru Lánsbrøv	166,4	0,5%
Norron Partabrøv	62,1	0,9%
Altjóða Partabrøv	68,0	2,6%

Gjaldoyra

	Kursur	+/- %
USD	640,41	-0,3%
EUR	742,87	0,1%
GBP	1039,28	0,5%
NOK	94,51	0,3%

Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.

Vika 19, 2003
www.kaupthing.fo

NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Hesi fingu prógv sum bókavørðar í fólkaskúlanum: Á myndini: Hanna Mikkelsen, Sumbiar skúli/Kommunuskúlin, Jensebeth Absalonsen, Viðareiðis skúli, Poula úr Gørðum, Skopunar skúli, Elin Olsen, Sankta Frans skúli, Súsanna K. Hammer, Norðskála/Oyri skúli, Lís í Jákupsstovu, Tofta skúli, Eyðgerð Abrahamsem, Fuglafjarðar skúli, Maria V. Christiansen, Eysturskúlin, Sjúrður á Kósini, skúlin á Ziskatrø, Hanne Jacobsen, Studentaskúlin í Hoydølum, Henning Tausen, Hoyvíkar skúli, Dagbjartur Debes, Føroya Læraraskúli, Anja Pálsdóttir, Venjingarskúlin, Katrin Reynisdóttir, Velbastaðar skúli, Mariann Steinberg Poulsen, Sørvágs skúli, Marin Joensen, Kollafjarðar skúli, Lydia Didriksen, Eysturskúlin, Gyðja Hjalmarsdóttir, Vestmanna skúli, Bergljót Reinert, Hvalvíkar skúli, Sørvi Andreassen, Vágs skúli, Bergljót av Skarði, Studentaskúlin í Hoyvík, Asta Wolles, Eiðis skúli, Augusta E. Petersen, Vestmanna skúli, Lena Jacobsen, Leirvíkar skúli, Bjørg J. Simonsen, Sernámsdepilin, Fríðbjørg Joensen, Sumbiar skúli, Ólavur Christiansen, Stranda skúli, Harriet Hansen, Argja skúli, Julia Lamhauge, Gøtu skúli, Asbjørn Berthelsen, Runavíkar skúlar, Karl A. Thomsen, Gøtu skúli, Eli Hentze, Sandoyar Meginskúli, Solveig Debess, Tofta skúli, Tove Rasmussen, CVU

Lærarar prógv sum bókavørðar

Mikudagin 15. mai fingu 33 lærarar prógv sum bókavørðar í fólkaskúlanum. Tað er fólkaskúladeildin í Mentamálaráðnum saman við Center for Videregående Uddannelse, CVU, í Keypmannahavn, sum hava skipað fyri hesum skeiði . Skeiðið, sum byrjaði í september í fjør, hevur fyri ein stóran part verið hildið sum fjarlestur. Eisini hava instruktørar frá CVU verið í Føroyum. Skúlabókasavnið og námsfrøðiligi tænastudepilin fær størri og størri týdning í fólkaskúlanum. Fólkaskúlalógin frá 1997 sigur, at skúlabókasavnið skal skipast sum námsfrøðiligur tænastudepil. Harvið setur skúlalógin krøv til fólkaskúlalærarar um at fáa útbúgving sum bókavørðar.

Tøkk

Øllum tykkum, ið við gávum, telegramm og á annan hátt gleddu okkum á silvurbrúdleypsdegnum, takka vit hjartaliga.

Jóhanna og Eifinn á Reynatrøð

Pat Boone spyr eftir myndum

Í tveimum av útvarpssendingunum "Afturhvarv" sum Birgar Johannessen og Djóni Andreasen skipa fyri hvørt leygarkvøld, hava teir saman við Victor Carlsen havt telefonsamrøður við heimskenda amerikanska golpel- og country sangaran Pat Boone. Tá Pat Boone, saman við familjuni, var í Føroyum í 1977, vóru nógvar myndir tiknar av teimum í býnum og á konsertunum, sum vóru hildnar í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Tilsamans 5000 fólk vóru til konsertirnar. Victor Carlsen stóð fyri øllum fyrireikingunum til vitjanina í Føroyum. Í telefonsamrøðunum við Pat Boone, sum í dag er 68 ára gamal, kom fram, at hann ongar myndir hevði frá túrinum í Føroyum, og at hann fegin hevði vilja fingið myndir og annað tilfar sum minni um túrin. Victor Carlsen og Birgar Johannessen hava nú tikið stig til at savna inn tiltar, myndir,

útvarpsamrøður o.a. frá vitjanini. Teir heita á fólk, sum liggja inni við myndum frá vitjanini um at siga teimum frá. Myndirnar verða skannaðar og sendar aftur til viðkomandi. Tey sum hava myndir kunnu seta seg í samband við Victor á tel. 212927 ella teldupost:victor@kallnet.fo

Tøkk

Hjartans takk fyri ta stóru samkenslu og hjálpsemi, sum víst var okkum, tá okkara kæra og elskaða kona, mamma, systir, vermóðir og omma

Vilgerð Astridardóttir
Tórshavn

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Tøkk øll tit, sum vóru um hana, og tit sum á einhvønn hátt hjálptu til, meðan hon var sjúk.
Tit vóru ein stór hjálp í neyðini.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk til starvsfólkið á B6 og á oknologiskudeild á Landssjúkrahúsinum, tøkk til Lágargarð.

Tøkk fyri troystarrík orð og til tykkum mongu, sum ringdu og luttóku í stóru sorg og sakni okkara.

Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

Tøkk fyri kransar, blómur og peningagávur til Spedalskheitsmissiónina.

Hjartans tøkk øll somul

Familjunnar vegna
Andrias og Manijeh

Petur í Gong deyður

4. august 1923 – 15. mai 2003

Hóskvøldið, 15. mai, andaðist Petur í Gong í Havn 79 ára gamal. Petur var føddur og uppvaksin í Havn, sonur Elsubeth Malenu, f. Petersen, úr Svínoy, og Sámal í Gong í Havn. Hann lærdi til skipstimburmann á Tórshavnar Skipasmiðju. Undir kríggjum var hann eina tíð í Íslandi, har hann arbeiddi á eini skipasmiðju. Eftir kríggið fór hann til Danmarkar á tekniskan skúla. Í 1946 giftist hann í Keypmannhavn við Jenny Hentze, úr Trongisvági. Tey fluttu heim aftur til Føroya í 1947. Petur arbeiddi eina tíð á Lítlu Beding í Klaksvík, áðrenn hann byrjaði sum sjálvstøðugur byggimeistari í Havn í umleið 1950. Hann hevði stórt byggivirksemi, og nógv fólk arbeiddu hjá honum. Hann gjørdi fleiri útstykkingar, bygdi sethús, raðhús, og aðrar bygningar til virkir og stovnar. Hann bygdi t.d. studentaskúlan í Hoydølum, sjómannskúlan í Havn og húsini hjá Havnar Arbeiðmannafelag. Hann var við í útbyggingini av Klaksvíkar Sjúkrahúsi í 60-unum og í nógvum øðrum størri byggiar-



beiðum. Tíðliga í sjeytiárunum stovnaði hann eina plastikrør verksmiðju á Heygnum Mikla í Havn. Petur sat í býráðnum í Havn í umleið 35 ár. Hann byrjaði sum varamaður á priva listanum hjá H.C.W. Tórgarð, og tá Tórgarð doyði í 1957, yvirtók Petur listan. Uttanflokkalistin hjá Peturi í Gong var í mong ár størsti listin í býráðnum.

Jenny í Gong andaðist í 1987. Jenny og Petur fingu 6 børn, tey eru: Janus, Sámal, Knút, Elsebeth, Marjun og Helgi.

Dagurin

20. mai. Angelica. Teir kenna onga halga konu við hesum navni.